Tórshavn 18. desember 2025

Barna- og útbúgvingarmálaráðið
J.H. Schrøters gøta 7
Postrúm 3279
FO-110 Tórshavn

Viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan - Ásetingar um skipan av landsroyndum - *ætlan møguliga at avtaka landsroyndina í náttúru og tøkni í 4. flokki*

Felagið tekur undir við ætlanini hjá landsstýrismanninum at avtaka landsroyndina í náttúru og tøkni í 4. flokki.

Lærarar hava í rúma tíð víst á, at landsroyndin í náttúru og tøkni órógvar undirvísingina í lærugreinini og dregur lærugreinina burtur frá endamálinum við lærugreinini.

Eitt týðandi endamál við undirvísingin í náttúru og tøkni er, at næmingarnir gera egnar upplivingar, royndir, eygleiðingar og kanningar, har næmingarnir menna kannandi arbeiðshættir, verkligar førleikar og síni skapanar- og samstarvsevni. Undirvísingin skal eisini vera verklig og granskandi og tryggja, at næmingarnir gjøgnum upplivingar kunnu nýta sítt forvitni og undran og áhaldandi menna síni evni og áhuga at granska og skapa fyri burðardyggari menning og nýhugsan. Landsroyndin tekur frá hesum endamálinum og lærarar verða heldur trýstir at venja til landsroynd, tí lærarin verður vigaður eftir landsroyndini og ikki undirvísingini annars.

Um lærarin skal náa endamálinum við lærugreinini, so eigur undirvísingin í stóran mun at byggja á egnar upplivingar hjá næmingunum og ein týðandi táttur í undirvísingini eigur at vera at vera úti í náttúruni. Hetta er virksemi sæst ikki so væl aftur í einum landsroyndarúrsliti, ístaðin dregur landsroyndin undirvísingina inn í flokshøli at venja til landsroynd, tí tað gevur betur úrslit í royndini.

Í 4. flokki er náttúra og tøkni nýggj lærugreinin, tí órógvar landsroyndin undirvísingina serliga nógv hetta fyrsta árið, og betur var, um eingin landsroynd var. Tað hevur týdning fyri áhugan hjá næmingunum, at lærugreinin byrjar væl og kann tillagast næmingunum, men við landsroyndini longu í 4. flokki, fyrsta árið næmingarnir hava lærugreinina, verður undirvísingin alt ov nógv stýrd fram ímóti eini roynd, bæði hvat viðvíkur innihaldi og arbeiðshættum. Um landsroyndin ikki var, so hevði lærarin munandi betur umstøður at fylgja veruligu ætlanini, so at næmingarnir kunnu gera sær egnar royndir í starvsstovuni ella úti í náttúruni, sum kunnu kveikja forvitni fyri náttúruni og tøknini.

Nú landsstýrismaðurin umhugsar at avtaka landsroynd í náttúru og tøkni í 4. Flokki, vil felagið eisini loyva sær at viðmerkja, at vert er eisini at umhugsa, hví vit hava landsroyndir í heila tikið. Hvat er endamálið við landsroyndunum, og um tað er rætt, at næmingar longu í 4. og 6. flokki skulu til roynd og fáa talmet.

Vegna Føroya Lærarafelag

Jacob E. Ols.

Jacob Eli S. Olsen

formaður